VIÐMERKINGAR

## Degns hús keypið ok



BEATE L. SAMUELSEN
Býráðslimur í Havn

**– Innlendismálaráðið tekur undir við fimm milliónа krónu húsakeypinum. Við hesum hava landsins myndugleikar og Tórshavnar býráð lagt støðið undir okraðum húsaprísum í kommununi. So vita vit tað, skrivar Beate L. Samuelsen**

Svarið, sum Innlendismálaráðið hevur givið í sambandi við klaguna hjá okkum í minnilutanum í Tórshavnar býráð, kom ikki óvæntað. Útvarpið kom jú við sama svarið upp á eitt eina møguliga kæru um húsakeypið ein tíma undan býráðsfundinum 15. desember 2005, har avgerðin skuldi takast.

Tí kendu vit svarið frammanundan, men hetta helt okkum ikki aftur.

Vit sendu kæruna til Innlendismálaráðið, har tað kommunala eftirlitið, sum skal ansa eftir, at kommunur taka sínar avgerðir sambært galdandi lóg, og at kommunur ikki seta lóggávu ella galdandi rætt til viks.

Vit í minnilutanum mettu tað sum okkara skyldu borgaranna vegna at mótmæla keypinum av Degns húsi, bæði tí vit vóru av tí áskoðan at húsið átti at verði virðismett av óvildugum myndugleika og at prísurin var alt, alt ov høgur.

Somuleiðis vístu vit á, at býráðið við keypinum av Degns húsi gekk á odda við at okra ognarprísirnar í Tórshavnar kommunu.

Í viðmerkingunum í brævinum frá Innlendismálaráðnum til minnilutan í Tórshavnar býráð 26. januar 2006, verður m.a. upplýst, teir avvísa kæru okkara og ikki gera meiri við málið.

**Út at venda**

Innlendismálaráðið metir, at býráðið við fimm millióna krónur húsakeypinum ikki hevur tikið eina avgerð ímóti galdandi lóggávu ella galdandi rætti.

Skil tað hvør, ið skilja vil!

Somuleiðis sigur kommunala eftirlitið seg ikki taka støðu til, um kommunalar avgerðir, ið eru tiknar innan fyri lógarinnar karmar, eru rímiligar ella um tær eru skilagóðar ella ikki, verður upplýst í svarinum.

Ja, men hvat ger eitt kommunalt eftirlit so, tá tað ikki kann meta, um ein avgerð er rímilig, skilagóð ella ikki, tá tað er kommunkassin, sum brúktur verður til skilaleyst húsakeyp?

Er tað veruliga rímiligur og skilagóður politikkur hjá einum býráð at keypa eini skralltóm hús fyri fimm milliónir krónur, sum eru so lítil sum Degns hús, har man innkomin, noyðist út aftur at venda, um man skal snara sær á og klóra sær í nakkanum?

Jú, tað er sera skilagóður politikkur og fínasta lagi sambært kommunala eftirlitinum.

Til samanmetingar kunnu vit nevna eitt risastórt gistingar í sjey hæddum (havi ikki talt tær) 100 metrar longri niðri í gøtuni, sum verður selt til privat fólk við mann og mús og innbúgvi fyri bert einar 25 milliónur, ella har á leið, sum tað ljóðar manna millum.

Tað er sanniliga munur á, hvør setir dagsskránna, tá tað kemur til húsaprísir í Tórshavnar kommunu.

# Slóðbrótari innan vevlist



*Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri handar Titu Vinther Mentanarvirðisløn Landsins á samkomu í Norðurlandahúsinum í mánakvøldið*

**Á samkomu í Norðurlandahúsinum mánakvøldið fekk vevlistakvinnan Tita Vinther handaða Mentanarvirðisløn Landsins frá Jógvani á Lakjuni, mentamálaráðharra**

VIRÐISLØN

– Mentanarvirðisløn Landsins verður latin Titu Vinther fyri hennara slóbrótandi arbeiði innan vevlist í Føroyum. Hóast hon ikki er uppvaksin í Føroyum, fær hon nógvan íblástur úr føroysku náttúruni, og er hon ein sonn undangongukvinna og serfrøðingur í plantuliting og at nýta tilfar úr føroysku náttúruni yvirhøvur.

Soleiðis segði nevndin, sum ger landsstýrismanninum tilmæli í sambandi við virðislønina.

Víðari verður sagt um Titu Vinther, at hon eisini hevur torað at brúkt annað tilfar enn tað vanliga og siðbundna; bæði menniskjahár og hestahár eru komin undir hennara kønu hendur og eru tvinnað og spunnin inn í listaverkini. Listarverkið "Santa Pæturs nót", sum er vevað úr menniskjahárum, hevur fingið sera góð ummæli bæði her heima og í øðrum londum. Fleiri av verkum hennara eru at síggja í Listasavni Føroya. Tita hevur megnað at lyft vevingina upp á eitt hægri listarligt støði, frá handverki til list, og á tann hátt hevur hon slóðað veg og veitt íblástur til aðrar kvinnur innan hesa listargrein.

Til tess at kunna fáa Mentanarvirðisløn Landsins skal tann, ið fær virðislønina, hava skapað listarligt lívsverk á høgøum listarligum støði ella hava skapað eitt ella fleiri listalig avrik, ið gera, at viðkomandi má haldast at hava uppiborið ein heiður sum Mentanarvirðisløn Landsins.

Mentanarvirðisløn Landsins er upp á 150.000 kr.

# Ungdómurin skal hava ávirkan

**Bill Justinussen, løgtingsmaður, fer á tingfundinum í morgin at spyrja løgmann og landsstýrið um, hvørji stig verða tikin til tess at tryggja ungdóminum størri ávirkan**

POLITIKKUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Hvørji ítøkilig stig hevur landsstýrið tikið til tess at seta løgtingssamtyktina um ungdómsluttøku í verk? Hevur válið verið fyri á landsstýrisfundi? Er nøkur niðurstøða gjørd um, hvørjar nevndir og hvørji ráð og stýri eru umfatað av samtyktini, og nær verður kanningarúrslitið latið løgtinginum og almenninginum?

Hesar fýra spurningar fer Bill Justinussen at seta landsstýrinum á tingfundinum í morgin, tá munnligir fyrispurningar eru á skránni.

Bill Justinussens vísir á, at løgtingið tann 5. apríl í fjør samtykti eitt uppskot til samtyktar frá Miðflokkinum um ungdómsluttøku. Áheitanin á landsstýrið var soljóðandi:

»Løgtingið heitir á landsstýrið um at kanna, hvussu føroyski ungdómurin kann fáa økta ávirkan í samfelagnum, herundir í hvønn mun føroyskur ungdómur skal hava, og møguliga verður tryggjaður, umboðan í almennum nevndum, ráðum og stýrum.«

Bill Justinussen sigur, at 29 tingfólk atkvøddu fyri uppskotinum.

– Hetta merkir helst, at løgtingið ásannar týdningin av, at ung hava størri og meiri beinleiðis politiska ávirkan í dagsins Føroyum. Hóast hetta, er enn onki frætt um kanningararbeiðið hjá landsstýrinum. Vónandi er tað ikki so, at landsstýrið hevur lagt løgtingssamtyktina í eina skuffu fyri at fara í gloymskuna, sigur Bill Justinussen.

Undir orðaskiftinum heitti Bill Justinussen beinleiðis á formansskapin um at taka upp sama tátt, sum í mong ár hevur verið royndur í okkara grannalondum viðvíkjandi ungdómstingi.

– Hesa áheitan hevur formansskapurin tikið í álvara, og verður fyrsta ungdómstingið sett í komandi viku. Ungdómstingið er eitt týðandi stig til tess at fáa ung í Føroyum at gerast virkin í politikki. Ungdómstingið er ein stoltleiki fyri Løgtingið, og kunnu vit øll fegnast um hetta tiltak. Men enn hoyrist onki frá landsstýrinum, og tí verður landsstýrismaðurin/løgmaður biðin um at greiða tinginum frá hesum spurningum, sigur Bill Justinussen.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!